## Vigar hálvt tons

Lívið er ikki lætt – heilt bókstaviliga – hjá 40 ára gamla Kenneth Brumley úr Texas. Sum myndin vísir er hann ein tungur harri, hann vigar ikki minni enn hálvt tons. Hann inntekur 30.000 kaloriur um dagin, tað sama sum ein vanligur maður inntekur í tvær vikur. Tá Kenneth herfyri skuldi á sjúkrahús til skurðviðgerðar, mátti brandliðið bróta ein vegg niður, áðrenn teir við krana fluttu hann á sjúkrahús. Har var neyðugt hjá læknunum at skera góð hundrað kilo av feitti burtur, áðrenn sjálv skurðviðgerðin kundi fremjast, skrivar The Sun



## Oops I did it again

Britney Spears hevur enn einaferð verið íblandað eitt ferðsluóhapp. Hesaferð rendi kenda sangarinnan upp í reyvina á einum bili, sum koyrdi framman fyri hana á Sunset Boulevard í Beverly Hills. Tað hendi kortini eingin mannskaði, og Spears tímdi ikki so frægt sum at fara úr bilinum eftir óhappið. Í staðin sendi hon bodyguardin hjá sær at tosa við kvinnuliga føraran av bilinum. Síðani fylgdi kvinnan eftir Britney Spears heim til húsar, har hendingin varð avgreidd, skrivar The Sun

# ól og summar



*Skiparin á Vestmenningi á seinasta túri, Arvid Petersen, stendur nærmastur av monnunum á myndini, nú teir júst hava hálað*

*Mynd: Karstin Vang*

gulllaksafiskiskapi ógvuliga lítil. Tú fært onkran hendinga upsa og onkran kongafisk, men hetta er einki nevnivert, sigur Arvid.

Skiparin sigur, at gulllaksurin, sum teir fingu á hesum túrinum, var góður.

- Skal gulllaksatíðin roynast, er neyðugt, at nøgdirnar eru stórar, tí prísurin er væl lakari enn upsaprísurin er í løtuni. Tú kanst ikki vera nøgdur við eini 6-10 tons í hvørjum háli. Veiðan eftir tóg, sum vara einar 5-6 tímar, skal helst verða eini 15 tons, og tá tosa vit um hampiligan fiskiskap.

Hann sigur, at tógini kunnu vera ymisk til longar – alt úr fýra upp í níggju tímar.

### Best um dagin

- Besta tíðin er oftast miðskeiðis á degnum, beint fyri middag ella tíðliga seinnapartin. Fiskiskapurin roynist ofta best í góðum og klárum veðri, og tað er ikki verri, um sólin stendur hægst á himmalinum.

Arvid heldur, at tað helst verður seinur dagur, áðrenn menn gerast klókir upp á gulllaksin, sum hann tekur til.

- Í veiði eftir øðrum fiskasløgum verður ofta hildið, at skýming og lýsing er besta tíðin, men soleiðis er ikki við gulllaksi. Tú kanst royna og lítið og einki fáa, men so knappliga stingur fiskurin seg uppaftur, og tú hevur rokfiskiskap.

Arvid sigur, at trolini, sum teir hava undir til veiði eftir gulllaksi, er ein blandingur millum botntrol og flótitrol.

- Trolini hava grunn, og meginparturin av veiðini fæst við botnin. Hetta er ikki sum við svartkjafti, sild, makreli ella kongafiski í Irmingarhavinum. Gulllaksur kann standa tættur, men ikki á sama hátt í veldiga stórum torvum sum hini uppisjóvar fiskasløgini, sigur hann.

### Hongur fastur

Hóast gulllaksur ikki verður kruvdur, men fer heilur í lastina, kann tað kortini vera strævið hjá manningini at fáa stór hál í tey 800 pund stóru kørini.

- Tað, sum serliga ger, at fiskurin kann vera tungur og strævin at arbeiða við hjá manningini, er, at hann glíður ikki avstað, sum annar fiskur, men meira at kalla hongur fastur og skal flytast við handamegi, áðrenn hann kemur á bandið, sum førir hann niður í lastina til ísingar.

Skiparin sigur, at tá fiskurin kemur úr sjónum er hann líka sum snikutur, men tá hann so tornar, hongur hann fastur allastaðni.

- Vit plaga at siga, at sleppur tú einum gulllaksi á eina plátu, sum hellir 45 stig, hongur hann fastur og fer ongan veg. Tað er líka við, at hetta er so, leggur hann aftrat.

Arvid sigur, at neyðug er at brúka nógvan sjógv, tá tú fæst við gulllaks, og soleiðis er eisini, tá posin skal tømast niður í pavnin.

- Eitt av teimum tungu arbeiðunum er at fáa fiskin úr pavninum og fram á bandið, sum flytir hann niður í lastina. Neyðugt er at skumpa fiskin við spaka og handamegi lítla pettið frá pavninum og yvir á bandið, og tað kann vera tungt, tá rúgvan er stór, og stutt er millum hálini.

### Roynist ymiskt

Skiparin á Vestmenningi sigur, at skal gulllaksatíðin roynast hjá skipi og manning, er neyðugt, at væl av fiski er at fáa, tí prísurin á gulllaksi er væl lægri enn prísurin á upsa.

- Vit fáa helst einar 3,50-3,75 fyri kilo av gulllaksi, og tí skulu vit helst fáa eini 220-250 tons um vikuna.

Arvid sigur, at summarhálvan vanliga ikki er besta tíðin til upsa og upsaprísir, men hetta er ikki allur sannleikin.

- Taka vit næstsíðsta summar, fór upsaprísurin upp í gjøgnum – ella heilt uppí 6,75 krónur fyri kilo. Tá góvust vit at veiða gulllaks longu í august og gjørdu nakrar rættiliga góðar upsatúrar.

Skiparin vísir á, at tað eisini hevur sína ávirkan á upsaprísin, at seks partrolarar fara á gulllaks, og minni upsi soleiðis verður á marknaðinum.

Arvid Petersen sigur, at í fjørsummar vóru Vestmenningur og Fram eisini lutfalsliga stutt á gulllaksinum, tí Fram breyt motorin, tá skipini høvdu verið nakrar túrar.

- Fram lá í ein mánaða ella so, og síðan byrjaðu vit aftur, men komu soleiðis ongantíð veruliga í gongd við gulllaksinum í fjør summar, sigur skiparin á Vestmenningi.